# Liðugt við NMT 900

**Í nýggja árinum verður einki samband við NMT 900 fartelefonir, tí henda skipanin heldur uppat at virka. Talan er um eina doyggjandi skipan og tí verður latið aftur fyri henni, verður upplýst av Føroya Tele**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*

Tey, sum í løtuni eiga og nýta eina NMT 900 fartelefon mugu hesar næstu dagarnar ringja so nógv sum tilber, tí 1. januar verður eingin at ringja til við teimum telefonunum, tá ið teir verða settar úr gildi, og skipanin gevst at virka.

Í løtuni eru einir 470 NMT 900 felagar í Føroyum, og hesir mugu venja seg við tankan, um at teir mugu nýta fastnet ella annan hátt at samskifta við.

Hjallgrím Hentze, tekniskurstjóri fyri Føroya Tele, sigur, at talan er í roynd og veru um eina doyggjandi skipan, og hetta hevur higartil merkt, at onnur lond hava valt at gevast við hesari skipanini, og tað verður sostakk eisini gjørt í Føroyum.

Føroya Tele hevur ikki gjørt íløgur í NMT í góð seks ár, og tað verður heldur satsað upp á GSM.

Sum heild eru tað nógv viðurskifti, sum gera, at tað ikki loysir seg hjá Føroya Tele og øðrum veitarum uttanlands at hava hesa skipan.

Í løtuni hevur Føroya Tele millum 25 og 26.000 GSM felagar, og tað verður mest sannlíkt eisini henda skipanin sum í framtíðini verður ment og nýtt.

Eisini NMT 450 skipanin verður tikin av. Hetta verður gjørt í seinasta lagi 31. desember í 2006.



*Hetta verður ein nógv meira sjálvsom sjón í framtíðini. Frá 1. januar ber ikki til at nýta NMT 900 í Føroyum.*

Evruseðlarnir á marknaðin:

# Evran kemur til Føroya 3. januar

**Fyrsta januar verður evnan sjónligt gjaldoyra í fleiri londum í Evropa. Í Føroyum verða fyrstu seðlarnir at síggja 3. januar. Hetta fer ikki at ávirka føroyska búskapin ella donsku krónina, metir fíggjarleiðari**

EVRA
*Heri á Rógvi*

Hin 1. januar í 2002 koma nýggir pengaseðlar og nýggjar myntir á gøtuni í 12 av teimum 15 ES-londunum, sum skulu avloysa tey galdandi gjaldoyruni. Tað eru bert Ongland, Svøríki og ríkisfelagin Danmark, sum ikki vilja hava evruna at vera galdandi gjaldoyra í egnum landi og ríki. Tað er tó framleitt so mikið, at hesi londini – eins og onnur – eisini fáa nakrar seðlar sendandi á nýggjárinum. Í Føroyum verða fyrstu seðlarnir ikki her fyrrenn 2. januar og almenningurin fær ikki hendi á teimum fyrrenn 3. januar.

Eftir hvat Sosialurin skilir, so verður hetta gjørt av trygdaráðum, tí danir tora ikki at senda seðlar til Føroya, áðrenn nýggjárið er skotið inn, tí hetta kann seta trygdina í vanda. Føroysku pengasamlarnir kunnu sostatt fara í pengingastovn seinnapartin hósdagin 3. januar og ogna sær nýggju evruseðlarnar.




*Ein tílíkur 500 evruseðil fer at kosta einar 3.720 krónur at ogna sær, men so kann hann eisini nýtast nógvastaðni.*

### Trý ár

Finn Danberg er fíggjarleiðari fyri Føroya Sparikassa, og hann sigur, at hetta ikki er nøkur stórhending í fíggjarheiminum, tí evran hevur verið galdandi gjaldoyra síðani 1. januar 1999. Hann sigur, at evran nú telist millum tey gjaldoyruni, sum teir hava mest við at gera – bæði teir sjálvir og kundar hjá Sparikassanum.

–Stórhendingin á nýggjárinum verður bert tað, at fólk fáa nýggjar seðlar um hendi, men hetta fer ikki at ávirka fíggjarheimin nakað stórvegis, tí hon hevur verið til í góð trý ár, sigur Finn Danberg.

Føroyingar, føroyski búskapurin og danska krónan hava einki at óttast fyri, um tú altso ikki eigur einar rúgvu av D-markum liggjandi undir madrassuni.

–Danska krónan er í einum fastkurssamstarvið við evruna, og hetta ger, at tað verður rættiliga javnur kursur, og vit hava ikki og fara ikki at merkja nakað stórvegis til evruna, sigur Finn Danberg.

–Fær okkurt ES-land tað trupult, so vil hetta eisini geva útslag á virðið á evruni, men tað kemur mestur ikki at ávirka okkum nakað stórvegis, sigur Finn Danberg.

Hann sigur víðari, at kursurin hevur ligið í miðal á 7,46, t.e. 746 DKR fyri hundrað evrur. Higartil hava bert heilt lítil frávik verið at sæð, og kursurin hevur í seinastuni ligið um 7,44.

Fyri Føroya Sparikassa og aðrar peningastovnar í Evropa verður tað lættari, tá tað ikki eru so nógv gjaldoyri at velja ímillum.

Tað hevur eisini verið borið upp á mál, at danir møguliga fara at broyta hugburð, nú teir fáa evruna millum hendurnar, og hon ikki longur verður eitt gjaldoyra, sum ikki kann síggjast nakrastaðni.

### Prýddir

Teir pengaseðlarnir, sum flestu evropearar fara at kenna nógv betri komandi tíðina eru prýddir við alskynsmyndum. Tað er nevniliga soleiðis, at hvørt landi sær eigur aðru síðuna av seðlunum, har landið sostatt kann seta eina ella aðra mynd, men virðið er sjálvsagt tað sama.

Tað er eitt sindur ymist, nær tað ymisku gjaldoyruni fara úr gildið, men tað er í øllum førum vist, at tey øll fara úr gildi.

Hjálparfelagskapir hava roynt at fingið hendur á teimum mongu pengunum, sum kanska fara til »spillis« fyrst í komandi ári, men hetta hevur bert eydnast partvíst.

Í Føroyum kunnu vit enn halda okkum til drótningina og føroysku náttúruna í komandi ári.



# Heini helt lyftini

*– Eg veit ikki, hvussu leingi eg verði sitandi, men tá tú hevur sitið í 25 ár, so telir tú niður, sigur Heini O. Heinesen*



**Heini O. Heinesen hevur 1. januar verið bygdaráðsformaður í Kunoy í 25 ár. Upprunaligu vallyftini um fast samband til Borðoynna fekk hann av vegnum fyri nógvum árum síðani. Nú eru tað bleytu virðini, sum liggja fremst í huga**

BYGDARÁÐSFORMAÐUR
*Eyðun Klakstein*

Nýggjársdag verða tað 25 ár síðani, at Heini O. Heinesen tók við sum bygdaráðsformaður í Kunoy. Undan kommunuvalinum í 1976 lovaði hann at arbeiða fyri, at Kunoyggin fekk samband við restina av norðoyggjum, og tað vallyftið helt hann.

– Størstu løturnar hesi 25 árini eru uttan iva, tá tað var koyrandi um Haraldssund, og tá tunnilin kom ígjøgnum til Kunoyar. Hetta hendi innan fyri eitt hálvt ár, sigur Heini O. Heinesen.

– At vit fingu samband við Borðoynna hevur havt avgerandi týdning fyri oynna. Fólkatalið minkaði nógv í árunum frammanundan vit fingu byrgingina og tunnilin, og hevði hetta sambandið ikki komið, so rokni eg við, at ta hevði staðið illa til í Kunoy í dag, sigur Heini.

Hóast arbeiðið at gera byrging og tunnil var ein landsuppgáva, so heldur Heini, at forarbeiðið hjá Kunoyar kommunu við útstykking og vegagerð í kommununi hevði avgerandi týdning fyri at tað bar til at fáa samband við restina av norðoyggjum.

### Telir niður

Tvær bygdir eru á Kunoynni, og hóast haraldssundsmenn stundum hava havt meirilutan í bygdaráðnum, so hevur tað hvørja ferð verið semja um, at kunoyingurin Heini skuldi vera formaður.

– Samstarvið millum báðar bygdirnar hevur verið sera gott, og eg havi altíð lagt meg eftir, at arbeiða fyri báðum bygdunum, sigur Heini O. Heinesen.

Heini varð valdur í bygdaráðið á valinum í 1976, og hann tók við sum bygdaráðsformaður 1. januar í 1977. Síðani hevur hann sitið í hesum sessi uttan steðg.

– Eg veit ikki, hvussu leingi eg verði sitandi, men tá tú hevur sitið í 25 ár, so telir tú niður, sigur Heini.

– Vit hava nátt teimum upprunaligu málunum, vit settu okkum fyri, og nú eru tað meira tey bleytu virðini, sum vit skulu arbeiða við komandi árini, sigur hann.

Heini O. Heinesen er eisini løgtingsmaður fyri tjóðveldisflokkin, og hann hevur verið formaður í flokkinum. Hann er íðin talsmaður fyri fiskimenn, og hevur í nógv ár havt stóran veljaraskara í norðoyggjum.

Nýggjársdag skipar bygdaráðið fyri móttøku í bygdahúsinum í Kunoy í sambandi við, at tað eru 25 ár síðani, at Heini O. Heinesen gjørdist bygdaráðsformaður.

# Rúsdrekkakoyring er fyri menn

**Tað er alment kent, sum fordómur, at mannfólk duga betur at koyra bil enn konufólk. Um tað sama er galdandi eftir at nakrir snapsir eru glidnir niðurum, man vera ringt at døma um. Men hagtøl benda á, at føroysk mannfólk um ikki annað halda seg duga betur at koyra bil rúsaðir enn konufólk**

*Rúnar Resitrup*

Bara fýra fólk av kvennkyni vórðu tikin fyri rúsdrekkakoyring í árinum 2000. Talið á rúsaðum bilførarum av hinum kyninum var 138. Tað vísa hagtøl í ársfrágreiðingini hjá Rúsdrekka- & Narkotikaráðnum.

Umleið sama lutfall var millum kvinnuligar og mannligar rúsaðar bilførarar í 1999, tá eisini bara 4 kvinnur vórðu tiknar fyrit at koyra við kenning, meðan 123 menn vóru tiknir fyri sama lógarbrot.

Tikið sum givið, at ferðsluløgreglan ikki sær millum fingrarnar, tá vøkur sprund koyra full, og at lutfallið millum tey, sum koyra við kenning, og tey, sum verða tikin fyrit at koyra við kenning er nøkunlunda rætt, kann við vissu staðfestast, at rúsdrekkakoyring er nakað, sum menn, og næstan bara menn, kundu funnið uppá.

Av teimum, sum tikin vórðu fyri rúsdrekkakoyring í 2000, høvdu bert 10 fólk eina promillum millum 0,5 og 0,8, sum fyrr var markið fyri rúsdrekkakoyring. Vanligasta promillan lá millum 1,5 og 2,0. Ein einsamallur bilførari var so dýrandi fullur, at hann hevði meira enn 3 promillu av alkoholi í blóðinum.

# Føroysk kvinna hópneyðtikin

**Ein 25 ára gomul kvinna, sum 7. desember var neyðtikin av fleiri monnum á einum jólaborðhaldi á Nørrebro í Keypmannahavn, er føroysk. Hetta visti danska Ekstrablaðið at siga hósdagin, og tað váttar Frode Olsen, kriminalinspektørur, fyri Sosialinum**

*Rúnar Reistrup*

Tilsamans ellivu mans eru í løtuni skuldsettir fyri at hava tikið lut í hópneyðtøku av einari 25 ára gamlari føroyskari kvinnu. Níggju teirra hava sitið fongslaðir um jólini. Hinir tveir og goyma seg fyri løgregluni.

– Teir eru eftirlýstir, og vit leita eftir teimum. Teir verða helst funnir innan stutta tíð, sigur Frode Olsen, kriminalinspektørur á løgreglustøðini á Frederiksberg við Sosialin.

Hann vil ikki gera nakrar beinleiðis viðmerkingar til málið, men váttar at kvinnan er føroysk.

### Ikki vandamiklir

Hóast tveir av teimum skuldsettu monnunum enn ganga leysir, og føroyska kvinnan fyri stuttum var um at taka fráboðanina um hópneyðtøkuna aftur av ótta fyri hevndaratsóknum, hevur løgreglan á Frederiksberg ikki valt at verja kvinnuna á annan hátt enn at halda tagnarskyldu um málið.

– Eg meti ikki, at hasir menninir eru vandamiklir, sigur Frode Olsen, kriminalinspektørur, og sipar her til teir báðar menninar, sum løgreglan hevur leitað eftir, síðan ræturin um miðjan desembur avgjørdi, at skuldsettu menninir skulu varðhaldsfongslast.

Annar av monnunum, sum í løtuni goyma seg fyri løgregluni, sigur í Ekstra Blaðnum hósdagin, at kvinnan ikki varð neyðtikin, men sjálv valdi at hava kynsligt samband við ellivu av teimum 27 monnunum, sum vóru savnaðir til jólaborðhald hjá einari handverksfyritøku í Keypmannahavn.

### Jólaborðhald

25 ára gamla kvinnan hevur greitt løgregluni frá, at hon hevði verið til eina aðra veitslu og var á veg heim, tá hon kom framvið hølunum, har teir 27 menninir høvdu jólaborðhald. Sambært frágreiðingini hjá kvinnuni, møtti hon tveimum av monnunum á gøtuni uttanfyri veitsluhølið, og tók av, tá teir bjóðaðu henni inn um tvey tíðina leygarnáttina 7. desember.

Hvat síðan hendi, eru kvinnan og teir ellivu skuldsettu og varðhaldsfongslaðu menninir ósamd um. Kvinnan sigur, at hon varð neyðtikin av fleiri monnum í garðinum uttan fyri veitsluhølið, meðan menninir vilja vera við at kvinnan ikki varð neyðtikin, men hevði havt kynsliga samveru við menninar av egnum vilja.

Løgreglan kannar nú málið út í æsir, millum annað við DNA kanningum, áðrenn møguligar ákærur verða reistar.

# Kórkonsert í Bø

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Í Bø hava tey eitt nýtt kór, nevnt Bíggjarkóri. Á ársins síðsta sunnudegi býður kórið til konsert í kirkjuni í Bø. Á skránni verða mest jólasálmar, onkur nýggjárssálmur, og eisini fer Signhild Jacobsen at spæla klarinett.

Bíggjarfólk eru syngjandi fólk, og eitt vikuskifti í november møttust ung og eldri í kirkjuni at vita, um til bar at fáa í lag eitt kór, sum kundi seta dám á jólahátíðina. Kórið hevur verið saman aftur nøkur vikuskifti síðani, og undirtøkan hevur verið so góð – við uttanbíggja bíggjarfólki um 30, sum er helvtin av manntalinum í hesari lítlu bygd – at kórið nú heldur seg til at bjóða fólki til hesa sang- og tónleikaløtu, sum verður sunnudagin kl 17.